


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 03 - 06 - 2013

# Oljurisin ExxonMobil enn meira virkin í Føroyum

Heimsins størsta oljufelag, ExxonMobil, hevur nú tikið eitt týðandi stig til at vera enn meira virkið á føroyska landgrunninum. Felagið hevur keypt 6% av partinum hjá Atlantic Petroleum í loyvi 016. Frammanundan hevur felagið 20%, soleiðis at tað nú eigur 26% av loyvinum. Hini feløgini, sum eru við í hesum loyvinum, eru Statoil við 40%, Dong við 30% og Atlantic Petroleum, sum eftir søluna til amerikanska oljurisan, nú hevur 4% eftir í hesum loyvinum. Tað var stór frøi í Føroyum, tá Statoil fyri nøkrum árum síðani kunngjørdi, at tað hevði selt partar av sínum loyvum til ExxonMobil, sum harvið gjørdist ein týðandi leikari á føroyska landgrunninum. Seinni hevur felagið keypt seg inn í uppaftur fleiri loyvi og er í dag partur av fýra av teimum fimm leitiloyvunum á føroyska landgrunninum. Tíðindini koma undan oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í morgin og mugu sigast at vera góð tíðindi fyri føroyska leiting. At hesin stóri oljurisin keypir uppaftur størri partar av føroyskum loyvum, kann bara vera tekin um, at felagið framhaldandi heldur føroyska landgrunninum vera áhugaverdan. Loyvið, talan er um, er tað norðasta á landgrunninum og liggur úti móti markinum.